# Generation Handball 2020

**Í Viborg**

## Generation Handball 27 juli – 01 august.

Generation Handball er ein stór altjóða hondbóltskapping fyri ungdómslið. Kappingin er í Viborg í Jyllandi, Danmark. Kappingin var á fyrsta sinni hildin í 2014 og er bara stútt voksin og í 2019 luttóku 185 ungdómslið, 23 vaksnamannalið og 53 dómarar frá 20 ymiskum londum. Kappingin/festivalurin fer fram á økinum á og rundan um Viborgstadium. Umframt hondbóltsvøllirnar eru beachondbóltsvøllir, sølubúðir, matartjøld, diskotek og ymiskt annað til stuttleika. Samstundis sum ungdómskappingin er, er ein vaksnamannakapping fyri professionel lið. So her er møguleiki at síggja hondbólt á hægsta stigi. Um kvøldarnar er ein beachhondbóltskapping mitt á festival økinum.
Allar finalirnar verða spældar innandura. Hetta er ein sera væl skipað kapping og á høgum støði hondbóltsliga. Ungdómurin fær upplivilsir og minnir fyri lívið, í bæði gaman og álvara. Fyri EB og tann einstaka leikara, er hesin túrurin sera gevandi sosialt og mennandi.

## Hvørji lið luttaka.

EB hevur melda fylgjandi lið til kappingina í 2020 :
G11 árg. (2009-2010-2011) - 1 lið
G13 árg. (2007-2008) - 2 lið
G15 árg. (2005-2006) - 1 lið
G17 árg. (2003-2004) - 1 lið
G20 árg. (2000-2001-2002) - 1 lið
D11 árg. (2009-2010-2011) - 1 lið
D13 árg. (2007-2008) - 1 lið
D15 árg. (2005-2006) - 1 lið

## Ferðing til og frá Viborg

**Møguleiki 1: Ferðing við EB-ferðalagnum**
Ferðing við Norrønu til Hirtshals, síðan við leigubussi til Viborg.
Leikararnir kunnu ferðast sjálvir saman við ferðalagnum.
Siglt verður av Havnini fríggjanátt/morgun og komið verður til Hirtshals leygardag og síðan við leigubussi til Viborg. Siglt verður heim aftur leygardag og komið verður á Havnina sunnukvøld.
Kostnaðurin fyri ferðina er uml. 2200-2300 kr. Í rokna allar máltíðir umborð. (Egin gjald)
Vit sova í 4 koyggjukamari og verður miða ímóti, at vit eru 3 spælarar og 1 leiðari á hvørjum kamari.

**Møguleiki 2: Ferðast saman við familjuni við Norrønu.**
Ferðing við Norrønu til Hirtshals, síðan við egnum bili til Viborg, Tilboð til Føroyskan ítrótt frá Smyril Line. Her er møguleiki fyri kobla eina familju ferð uppí túrin. Møguleiki er fyri at leingja ferðina 1 viku áðrenn ella eftir kappingina.

**Møguleiki 3: Ferðast saman við familjuni við flogfarið.**

Ferðing við flogfari, Vágar – Billund, síðan við leigubili frá Billund til Viborg.

Ynskiligt er at leikararnir koma til Viborg sunnudag 26. juli, so leikararnir kunnu verða við til túrin í Djurs Sommerland sunnudag og hava høvi til at njóta Viborg mánadag. Fara í býin at keypa, út at eta o. a., áðrenn kappingin byrjar týsmorgun. Tá kappingin er byrja, er lítil og eingin frítíð. Leikararnir spæla 2 dystir um dagin, og tá teir ikki spæla sjálvir, verður hugt eftir øðrum EB-liðum.
Heim aftur leygardag eftir døgurða, soleiðis at øll hava møguleika at síggja finalurnar, sum allar verða spældar leygardag. Um so er at vit fáa eitt lið í onkra av finalunum, tá er sera gott at hava nógvar føroyskar áskoðarar. Tað eru bæði a og b finalur.
Í 2018 komu G1 í b–finaluna.

# Generation Handball 2020

**Í Viborg**

## Gisting í Viborg

Gist verður á Viborg Katedralskole. Gl. Skivevej 2, DK-8800 Viborg. Hettar er sami skúli, sum vit gistu á í 2018.
Leikarar, venjarar og liðleiðarar búgva á skúlanum. Tað er ymiskt, hvussu nógvar liðleiðarar hvørt liði hevur tørv á.

- U11 krevur 1 leiðara per 4 leikarar.
- U13 krevur 1 leiðara per 5 leikarar.
- U15 krevur 1 leiðara per 7 leikarar.
- U17/19 krevur 2 leiðarar per lið.

Foreldur og systkin kunnu leiga sær íbúðir á Airbnb, búgva á campingplássinum, hostel ella hotel í Viborg. Mælt verður til at búgva nærhendis býnum, so møguleiki er at síggja so nógvar dystir sum gjørligt og at stuðla øllum EB- hópinum tá spælt verður.
Camping og hostel í Viborg.
https://www.visitviborg.dk/viborg/overnatning
hotel í Viborg
https://generation-handball.dk/hotel-i-viborg/

## Ábyrgdarøkir – EB og fyrireikingarbólkinum.

**EB** meldar liðini til og tekur sær av, at bíleggja ferðina við Norrønu, at tilmelda liðini, skráseta leikarar og leiðarar, bíleggja gisting, mat, útferð til Djurs Sommerland og alla busskoyring á túrinum.

**EB** skaffar stuðlar til og bíleggur spælitroyggjur, sum verða brúktar á túrinum.

**Fyrireikingarbólkurin** skipar innsavningina til túrin - fløskuinnsavnan og lutaseðlar.
- skipa fyri hølum at sortera fløskur í, fáa skriv út í øll húsini, samskipa innsamlingina og avgreiða fløskurnar. Fyrst í januar verður skipa fyri fløsku innsavning í øllum Sundalagnum.
- finna vinningar til lutaseðilin, fáa prenta seðlar og samskipa søluna. Í mars fáa leikararnir Skava & Vinn lutaseðlar, sum tey skullu selja. Fyrireikingarbólkurin tekur **ikki** ímóti óseldum seðlum.

## Uppgávan hjá venjarum og leiðarum

Uppgávan hjá venjarunum og leiðarunum er, at hava ábyrgd av leikarunum bæði tí leikliga, praktiska og sosiala t.d. :

- venjing fram til túrin.
- í Viborg upphiting, taktikki, dysti og útskiftingum.
- at spælaraklæðini eru klár.
- at 2 bóltar eru tøkir til hvønn dyst.
- at 1 sett av vestum eru tøkir til hvønn dyst.
- at 1 fyrstihjálparataska er í spælara taskuni ( plástur, gazebind, forbinding, saltvatn, saks, 1 stk. tape, 2 stk. ísposar)
- Kanna á hvørjum vølli dystirnir verða spældir.
- at leikararnir fáa nokk av vætu áðrenn og undir dysti (serliga um nógvur hiti er)
- at stuðla leikarunum at halda avtalur, m.a. songartíð, matarsteðg o.a.
- verða tøkur, um onkur hevur tørv á hjálp til eitthvørt
- eftir tørvi at fjálga um liðið sosialt og mentalt

# Generation Handball 2020

**Í Viborg**

## Praktiskar upplýsingar

Allir innleiðandi U11, U13 og U15 dystir verða spældir uttan - dura á grasi á Viborgstadion ella Paraduplássinum uttan fyri stadion. Tí verður mælt til, at hesir aldursbólkar hava gaggir við. U17 og U20 dystirnir verða leiktir innandura í høllunum rundan um Viborgstadion.

Bólkaspæl verður spælt týsdag og mikudag. A og b endaspæl hósdag og fríggjadag. Allar finalur verða leiktar leygardag. Í øllum aldursbólkum verða finalurnar leiktar innandura.

Øll lið fáa minimum 6 dystir.
U-11 og U13 : 2x15 min— 1 dómari.
U-15, U17 og U21 : 2x20 min— 2 dómarir.
Tíðin verður **ikki** steðga í hálvleikinum.
Allar finalur verða dømdar av 2 dómarum.
Loyvt er at hava 3 dispensatións spælarar á liðnum, tvs. spælarar, sum eru 1 árgang ov gamlir.

**Beach hondbóltskappingin** byrjar mánakvøld og koyrir til fríggjakvøld. Kappingin er skipa soleiðis, at vinnarin fer víðari og taparin er úr kappingini. Hvørt lið í Generation Handball kappingini kann melda 2 lið til Beach hondbóltskappingina.
Dystirnir verða leiktir mitt á festivaløkinum har 3 beach hondbóltsvøllir eru gjørdir.
U11, U13 og U15 : 1x11 min - 1 dómari
U17 og U21 : 2x9 min - 2 dómarar.
Tíðin verður **ikki** steðga í hálvleikinum.

Hettar er ein sera stuttlig kapping, sum saman sjóðar alt ferðalagið.
Í 2018 komu G12 í finaluna, sum var spæld fríggjakvøld.

## Bóltstøddir

- U11 gentur og dreingir stødd 0 (46-48 cm) u/harpiks.
- U13 gentur og dreingir stødd 1 (50-52 cm) u/harpiks.
- U15 gentur og dreingir stødd 2 (54-56 cm) harpiks.
- U17 gentur og dreingir stødd 2 (54-56 cm) harpiks.
- U21 gentur og dreingir stødd 2 (54-56 cm) harpiks.

## Kostnaður/felagsinnsavning

Kostnaðurin íroknað ferðina við Norrønu, buss Hirtshals/ Viborg retur er uml. 5.800 kr. per leikara. Fyri tey, ið ferðast sjálvi, er kostnaðurin 3500 kr. og er tað henda upphædd, sum skal samlast inn í felags innsavningini.

Við í hesum gjaldinum er :

•Luttøkugjaldið er 1.650 kr. íroknað 3 máltíðir um dagin, innivist á skúlastovu við madrass, kodda, dýnu og seingjarklæðum.
•Eyka nætur (innivist+matur) 290 kr per leikara, per nátt.
•Venjara/leiðaragjald 780 kr per leikara.
•Túrur til Djurs sommerland 250 kr. leikara

•Busskoyring

•Liðgjald

# Generation Handball 2020

**Í Viborg**

## Telefon og lummapengar

Tað er loyvt at hava tlf við undir egnari ábyrgd og við avmarkaðari nýtslu, og verður hetta avmarka av leiðaranum.

Er eitthvørt við barnið tínum, so vinarliga boða leiðaranum frá.

Tað ber altíð til at fáa fatur á leiðara pr. tlf

Lummapengar (danskir seðlar) (50 kr pr.dag í 5 dagar til børn fødd í 2007, 08, 09, 10 og 11), Sommerland xx kr, Shopping túrur xx kr, Norrøna xx kr.

Hvørt foreldur kemur við brævbjálva, sum navn á barni og lið standa á og hvat pengarnir eru til...... lummapengar, sommerland, shopping, ferðing.

Til børn eldri enn 2006, er upp til hvønn einstakan hvat lummapengarnir er.

## At hava við

- Pass, Bláa kortið (ferðatrygging, tryggingakort)
- Heilivág
- Vatndunk
- 1 stk handklæði (fáa 1 á staðnum)
- Toilettasku
- Sólbrillur, Sólkrem & Aftersun
- 2 Svørt shorts at spæla dyst í
- T-shirt
- Hosur +4 pør av hvítum hosum at spæla dyst í
- Merkt skiftiklæðir til 10 dagar (tað er summar)
- Regnjakka
- Hondbóltsskógvar
- Gaggir - spælt verður uttandura á gras hjá U11, U13 og U15
- Svimjiklæðir og evt svimjubrillur
- Inniskógvar
- Vanligar skógvar
- Hondbólt

## Skrá fyri túrin

| | |
|---|---|
| Fríggjadag 24. Juli : | Fráferð við Norrønu. |
| Leygardag 25 juli : | Koma til Viborg, taka okkum av løttum, møgulig venjing. |
| Sunnudag 26. Juli : | Útferð til Djurs sommerland. |
| Mánadag 27. Juli : | Venjing, handils túrur. |
| Týsdag—fríggjadag : | Hondbólts kapping. |
| Leygardag 01 aug : | Møguligar finalur og heimferð. |
| Sunnukvøld. 02 aug: | Koma á Havnina. |

Øll, sum eiga eina EB-drakt, ferðast í EB-drakt.
Hetta ger tað nógv lættari at síggja og finna hvønn annan.
Børnini koma at verða í spælaraklæðum fyri tað mesta gjøgnum dagin og í shorts- ella joggingbuksum um kvøldarnar.